# H71

faldari 6

FTZ KAPPINGIN

## H71 - KYNDIL

Mikukvøldið 17. feb. kl. 19.30

Hoyvíkshøllin



SUÐUROYAR SPARIKASSI
J&K
BONUS -er biligari!
P/F THOMAS DAM ITRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgøta 5 · Tel. 31 14 03
polytan
Advokatfelagið Yviri við Strond 4
Auto Service

# FOKUS

18:29

## Lætt og stuttligt



Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

AnniJanni

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



# „NEI TIL RUSGIFT“

Hesa orðing plagdi eg at lesa á einum klistrimerki, ið okkurt yngri systkin hjá konuni hevði sett á eitt spegl í heimi teirra í Vestmanna og sum var fingið í avhaldsfelagnum Losjan, har flestu vestmenningar høvdu sína gongd í pørtum av tíðini í uppvøkstri sínum. Slík merki høvdu vit ikki í heimbygdini, tá henda rørsla ikki hevði nakað virksemi í Hoyvík. Onkur vil kanska vera við at tað neyvan hevði skatt um slíkt virksemi hevði verið rikið í Hoyvík í uppvøkstri okkara, tí eingin ivi skal vera í, at henda rørsla avgjørt hevur haft og enn hevur sín virkna og avgjørda leiklut í samfelagi okkara.

Tó er tað ein rús, ið sjálvt avhaldsrørslan góðkennir og tað er finalurúsurin. Hesin tølandi og altumfevnandi rúsur, ið settur seg í likam og sál, tá ítróttarlið títt hevur bart seg ígjøgnum og stendur sigrandi eftir í semifinaluorrustu og nú bert bíðar eftir altavgerandi finalu. Ein bíðitíð har allir møguleikar enn eru opnir, sinnið er ríkt og tú kanst loyva tær at hava vónir og í dreymi lyfta sigursbikarinum um høvur, skuldi sigurin verið borin til húsa.

Hesum rúsi er hann, ið skrivar hesar reglur, í, eftir at fremsta lið okkara í gjár í Hoyvíkshøllini sigraði 25 – 20 á KÍF og harvið vann inn aftur tað tap á 21 – 23, vit vóru fyri í fyrru semifinaluni í Kollafirði hósdagin undan. Í seinru semifinaluni lat H71 ongantíð nakran iva vera í, at H71 veruliga ætlaði sær í steypafinaluna í ár. Longu tá 6 minuttir vóru farnir av dystinum, vóru vit á odda 6 – 0. Tá 22 minuttir vóru leiktir, hevði KÍF bert skorað

*framhald á síðu 13*

2X3

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN



# Avatara

## Ein heilt nýggj og serstak verð innan gólv

**AVATARA**

Avatara er eitt gólv við fyrimunum frá bæði tí slitsterka laminatgólvinum og tí ektaða parkettgólvinum. Nýggja avataragólvið líkist fullkomiliga einum trægólvi, hevur træstruktur og er mjúkt og heitt, júst sum træ. Samstundis er avataragólvið líka slitsterkt sum eitt laminatgólv og krevur einki viðlíkahald. Prísurin er heldur ikki at fara skeivur av: Avataragólvið er munandi bíligari enn eitt parkettgólv.

Prísir úr 158,- fyri m²

30 ára garanti

NÓGV YMISK & SERA VØKUR MYNSTUR

- **Júst sum træ at síggja til**
- **Strukturin kennist sum træ**
- **Heitt og mjúkt at ganga á**
- **Luktfrítt og heilsugóðkent**
- **Slitsterkt sum laminatgólv**



TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN


VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
SENDISTOVAN

SENDISTOVAN

NordikSOLO 18+

# Kom best frá byrjan við NordikSolo

Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.

Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.




BANKNORDIK

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger







Dekk
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
- sjálvandi frá Bilrøkt!
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


WAAG
& COMPANY
WAAG & Co. P/f
Hoyvíksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo
www.waagbilar.fo
OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00
WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen






Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

**Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avslátttri**

*Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.*

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

ÁTAKSTILBOÐ:
**LUKSUS FAMILJUBILUR ÚR 390.000 KR**



**NÝGGJUR VOLVO V70 TRIBUTE**
**EITT SINDUR MEIRI AV TÍ GÓÐA TIL TÍN**

Volvo V70 er ein sannur svenskur stationbilur. Stórur, hegligur, tryggur og sannførandi gjøgnumførdur úr enda í annan. Tann nýggi Tribute frá 2016 er veruligt skandinaviskt marglæti í teirru góðu og kendu Volvogóðskuni og við einum longum lista av útgerð. Fíggjarliga kanst tú gera kubbið júst nú bæði í mun til sjálvan bilin og í mun til útgerðspakkan. Bóka ein royndartúr hjá Wenzel

**ÚR 390.000 KR**

P/F Wenzel | Akranesgøta 5 | FO-100 Tórshavn | tel 35 45 00 | fordpost@wenzel.fo | www.wenzel.fo

WENZEL



NORÐOYA SPARIKASSI

# Orkulán 2,5%

*- Bústaðarlán við lágari rentu*

***Bílegg eitt kundaprát***
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*

*framhald av síðu 4*

tvey mál, vit vóru á odda 8 – 2 og høvdu dyggiliga jørðað ta leiðslu KÍF hevði undan dystinum og helst hevði ætlað at dúga á fyri at vinna sær finalusessin í steypakappingini.

Eftir at seinra semifinalan var lokin og greitt var, at H71 skuldi vera annað liðið í finaluni í fremstu deildini hjá monnum, var samstundis greitt, at H71 hevur lið í øllum steypafinalum í harradeildini í ár, nevniliga í D10, D12, D14, D16, D 18 og í fremstu mansdeildini og man hetta helst vera eitt slag av rekord innan hondbólt. Í kvinnudeildini eru vit sanniliga eisini væl umboðaði og hava vit lið við í trimum av fimm steypafinalunum, nevniliga í G10, G12 og G17 og vantar okkum bert lið við í finaluni í G 14 og fremstu kvinnudeildini. Í G14 taptu vit tepurt við 13-14 fyri VÍF í semifinaluni, men enn vantar nakað í hjá fremsta kvinnuliði okkara at koma í finaluumhvørvið.

So um nakar kann tosa um finalurús í skrivandi stund, so er tað H71 – og vit njóta hvørja løtu. Tí hóast felagið í ár verður 45 ár og ikki er nakar ársungi longur, so er tað fyrst hesi seinastu árini at bragdað hevur í hjá okkum í finaluhøpi. Ja fremsta manslið okkara hevur bert einaferð vunnið steypafinaluna og hevur H71 í allari tíð sínari bert tríggjar ferð verið við í steypafinaluni, harav einaferð við 2. liði.

Men tá tygum, kæri lesari, sita við hesum faldara í hondini, er hetta alt søga, finalan leikt og vinnarin funnin. Hvørt tað fyri okkum í Hoyvík verður sum Janus kvað á sinni: „Hvat hildu faðir og móðir, brøður og systir, um eg av leikvøllum kom, bæði svangur og tystur, skræddur, rivin og særdur, sigurin mistur – styrki teg Kristur" ella um hoyvíkingar tá heldur við Freddy Mercury og Queen fara at kvøða **„We are the champions"** vita vit til ta tíð.

> ***» hóast felagið í ár verður 45 ár og ikki er nakar ársungi longur, so er tað fyrst hesi seinastu árini at bragdað hevur í hjá okkum í finaluhøpi***


**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

Randi Frederiksberg, 212000,
randi.frederiksberg@gmail.com

**ÁBYRGD AV FALDARA**
Sunneva Jakobsen,
231115, sunneva@liv.fo

**ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705
*Forsíðumynd: Jan Sørensen*

**ÚTGEVARI**
H71






H71


19


1
H71
BONUS









# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN




**Aldur?**
15 ár.

**Deild?**
G17 og 1. deild kvinnur.

**Hvørjum plássi spælur tú á?**
Bakspælari.

**Hvør á liðnum hjá tær er stórsta drama-queenin?**
Tóra, tí hon flippar út av ongum.

**Hevur vánaligasta tónleikasmag?**
Eisini Tóra.

**Hvør brukar longst tíð frammanfyri speglinum?**
Eva Barba, tí hon skal vaska ansigt aaallatíð.

**Er festligast at vera í brúsu saman við?**
Eisini Eva Barba, tí hon hevur so serlig ritualir.

**Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?**
Einaferð eg skoraði uppá fríkast, tá tíðin var farin.

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
Nei, tad havi eg ikki.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
Tá vit vunnu føroyameistaraskapið í 2014, har tveir vunnir dystir á Neistanum vóru hæddarpunktini.

**Hvør er besti leikari, ið tú hevur spælt ímóti?**
Veit ikki akkurát hvør genta, men nokk ein á russiska U17 landsliðnum.

**Hvat fyri skoritriks hevur riggað best hjá tær?**
Einki hevur riggað enn :(

**Hevur tú nakra flovisliga hondbóltssøgu at fortelja?**
Tá vit vunnu føroyameistaraskapið í g10, og eg fór at gráta, tí eg ikki slapp at taka steypið.

**Hvat er títt yndlings #hashtag?**
#15skrigendebitches

**Hevur tú nakað motto?**
Not better, just arrogant.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
Tað góða samanhaldið.

J & K

# ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J & K

## J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN



# Takk fyri at tú stuðlar Javna

## Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

## Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at  stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

javni
Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo





polytan®

simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
fax: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent

# Er skeltingin í lagi?

Vilt tú síggja gott út, hava kundar í handilin ella bíleggingar til fyritøkuna, kann skeltingin gerast munurin millum at eydnast og ikki eydnast. Tað skal ikki altíð so nógv til, og tað nýtist ikki at kosta nógv.

**Hugsa stórt – hugsa Føroyaprent**



Á Føroyaprent hava vit eitt framkomið skeltiverkstað, har vit kunnu framleiða nærum alt, tú kanst hugsa tær.

- Lýsandi stavir á stórar bygningar
- Smá skelti sum t.d. navnaskelti til skrivstovuna
- Stórar plakatir og bannarar til tiltøkini í summar
- Foliuprent til veggir, vindeygu og bilin

Nethandil

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

Føroyaprent
Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo






RÁKIÐ



VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til HITA
SANITET &
VENTILATIÓN

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000



www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000
Eik


PÆTUR
H71
HOYVÍK

# **LANDSPOLITKARAR** SVARA SPURNINGUM

**FÝRA HOYVÍKINGAR SITA Í LØTNI Á TINGI, VIT HAVA SETT TEIMUM NAKRAR SPURNINGAR UM TAÐ AT VERA HOYVÍKINGUR OG UM H71, SJÁLVSAGT. Í HESUM FALDARANUM HEVUR FISKILMÁLARÁÐHARRIN SVARAÐ SPURNINGUM. HANN SIGUR MILLUM ANNAÐ, AT HANN ER HOYVÍKINGUR UM EIN HÁLS – OG AT BYGDAFRELL BLEIV RÓPT EFTIR HONUM, TÁ HANN SUM DONGUR FÓR OMAN TIL HAVNAR VIÐ ØÐRUM HOYVÍKINGUM.**



## Hvat er tað besta við at búgva í Hoyvík?

– Eg elski Hoyvík. Og at míni kæru – Hildur og børnini: Sjúrður, Brim og Helgi – hava viljað búð og livað saman við mær her, er tað besta. Hoyvík hevur alt, sum skal til fyri at liva eitt gott og ríkt lív í verðini. Hoyvík er ein bygd við øllum sínum serligu støðum og plássum – úr fjøruni til dalarnar, plantasjuna og hagan. Vit hava skúlar, ítróttarhøll, kirkju og onnur hús at koma saman í. Hoyvíkin hevur eina ríku søgu, sum er skapt av øllum teimum, sum hava livað og virkað her. Fyrst og fremst er Hoyvíkin fólkini, ið búgva her. Tað er samanhald og vinarlag og hjálpsemi ímillum tey, sum ger tað so gott at búgva í Hoyvík. Og so sjálvandi H71, sum savnar okkum um alt tað.

## Kennir tú teg sum hoyvíking?

– Ja, um ein háls. Um onkur kallar meg havnarmann, gerist eg grummur. Eg eri uppvaksin her, tá ið Hoyvík enn var ein lítil bygd við kanska 60 fólkum.

Abbi mín vaks eisini upp her – niðri í Hoydølum. Eg havi gingið í skúla her allan barnaskúlan *(annaðhvørt ár gingu vit í skúla á Hvítanesi)*. Nógv halda, at eg skrøggi, tá ið eg fortelji, at tá ið vit sum børn vuksu upp her, vóru vit nærum ongantíð í Havn. Tað var langt burturi. Tá ið vit gjørdust eldri og byrjaðu at fara oman til Havnar onkuntíð *(altíð í flokki)*, so róptu tey „bygdamenn" og „bygdafrell" eftir okkum.

**Hvørji eru tíni hjartamál?**

– Míni hjartamál eru at Føroyar skulu gerast ein sjálvstøðug og sjálvbjargin tjóð í Heiminum, har fólkið – sum er tjóðin – hevur somu og javnbjóðis rættindi at skapa sær eitt frælst og gott lív uttan mun til hvussu ymisk vit eru og hvussu vit eru fyri. Og at vit eru samhaldsføst og hava felags at ábyrgd av at tryggja sosialt rættvísi og møguleikar hjá øllum at liva og menna seg.

**Hvat merkir tað fyri teg at vera hoyvíkingur?**

– Hoyvík er mítt heim. Tað er hiðani frá, at mín verð byrjar og mín samleiki hevur sínar røtur. Eisini tá ið eg kenni meg sum føroying og sum heimsborgara og eri aðrastaðni í verðini og í lívinum. Her eru fólk og vinir, ið geva mær styrki – og her er fallið mítt akker.

**Hvar í Hoyvík dámar tær best at ganga túr?**

– Eg gangi alt ov sjáldan túr. Men besti túrurin er ein langur túrur: Frá ovast haganum *(uppi Millum Gilja)*. Oman í ovaru Hoydalar umvegis Svartafoss og fram við ánni. Oman gjøgnum plantasjuna í Hoydalar og út á fløtuna. Út á Boðanes. Og so eftir Gamla vegi oman á Støðna. Út til Heljareygað. Yvir í Lítluvík og víðari til Hólmasund. Og so heimaftur eftir leiðini Heima á Garði og niðan ígjøgnum Geilina.

**Fer Hoyvíkin, H71 og hoyvíkingar á nakran hátt at merkja, at tú ert á tingi?**

– Tað er ikki so, at eg reki lokalpolitikk á tingi fyri Hoyvíkina. Men vónandi kunnu tey mál, ið vit arbeiða við fyri allar Føroyar og allar føroyingar, eisini vera til gagns fyri Hoyvíkina, H71 og hoyvíkingar.

*»Eg droymi um og arbeiði fyri, at ítróttur – og harvið eisini hondbóltur – fær betri umstøður og raðfestingar á landsins fíggjarlóg*

**Hevur tú nakrantíð spælt hondbólt? Hvar á vøllinum spældi tú tá? Og við hvørjum?**

– Eg havi spælt hondbólt við H71 frá fyrstu ferð, at felagið byrjaði at spæla hondbólt. Eg spældi á strikuni. Havi ongantíð spælt við nøkrum øðrum felag – uttan tá ið eg var í Danmark í lestrarørindum og spældi í ÍF Føroyum.

**Heldur tú við H71?**

– Haldi við H71 so leingi sum eg livi.

**Ert tú nakrantíð til hondbóltsdyst?**

– So ofta sum eg yvirhøvur kann, eri til hondbóltsdyst tá ið H71 spælir. Og eg haldi, at eg havi sæð øll liðini og allar spælararnar spæla – bæði hjá monnum, kvinnum, gentum og dreingjum.

**Hevur hondbólturin nóg góða raðfesting á landsins fíggjarlóg? Grundgev :)**

– Eg droymi um og arbeiði fyri, at ítróttur – og harvið eisini hondbóltur – fær betri umstøður og raðfestingar á landsins fíggjarlóg. Serliga við atliti til at menna landsliðsarbeiði fyri ung, betri venjingarumstøður, ítróttarskúlar o.a.

# 80'ini Umaftur

**Hetta søgdu fólk farna ár:**

*– Eg kendi meg sum eina 18 ára gamla … og ØLL vóru har*

*– OMG … náttin fleyg avstað*

*– Deiligt, at har eisini vóru menn*

*– Eg dansaði ALLA náttina*



BOOKIÐ BARNAGENTUNA TIL HIN 20. FEBRUAR! TÍ TÁ VERÐA 80-INI UMAFTUR! Í HOYVÍKSHØLL Á FJÓRÐA SINNI. OG VIT GLEÐA OKKUM ALMIKIÐ. DYRNAR LATA UPP KL. 23. OG VIÐ EITT LJÓMA 80-ARAHITTINI OG TÚ SÆR DISKOKÚLUR, KREPT HÁR OG GLAÐ FÓLK, SUM EISINI VÓRU Í DALLAS, HØLIÐ, GLYVRA BIO OG ALBERT HALL, TÁ TÚ VART HAR. SHOWMENN OG PLÁTUVENDARIR GEVA OKKUM EINA FRAMÚR BREIÐA OG NOSTALGISKA TÓNLEIKAUPPLIVING.



**Hvør minnist ikki:** *Opus, Life is Life – AHA, Take on me – Modern Talking, Cherry Cherry Lady – Madonna, La is La Bonita* og allar hinir sangirnir, sum geva okkum flash back til 80-ini við wunderbaumjólatrøum, neon, Jane Helen gele og kasettubandupptakara og plátuspælara?

Vit í H71 ynskja at skapa karmarnar og geva tær eitt stuttligt, hugnaligt og nostalgiskt kvøld sum far teg at minnast aftur á góðar løtur í 80-unum.

Vit fegnast um, at undirtøkan hevur verið so avbera góð til hetta tiltak. Tá vit fóru undir fyrireikingarnar á fyrsta sinni vóru vit heldur fjálturstungin: Mundu fólk vera við upp á eitt 80-arakvøld? Fór undirtøkan at verða nóg góð? Vóru fólk við upp á alment dansitiltak í Hoyvíkshøll?

Fyrsta árið var útselt á midnátt, tað kvøldið tiltakið var og í fjør var útselt tvær vikur undan tiltakinum. So best er at bera seg skjótt at. **Tí tá útselt er – er útselt!**

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt
sunt og gott
fast:
www.fast.fo

# h71 klæðini 2015/16



h71 INTERSPORT
Thomas Dam Ítróttur
adidas


Vælkomin inn á gólvið hjá okkum ... her finnur tú altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315


Matstovur keypa gass og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909


SKORA VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

FAROE SHIP

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT

løggildir
grannskoðarar

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**





*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og haraftur at allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahaldsútreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com




SENDISTOVAN
amr.fo

# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í FTZ DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 23.09.2015 | H71 | Neistin | 27-16 |
| 26.09.2015 | H71 | StÍF | 25-22 |
| 04.10.2015 | VÍF | H71 | 25-30 |
| 11.10.2015 | H71 | T. Klaksvík | 31-23 |
| 15.10.2015 | Kyndil | H71 | 22-25 |
| 01.11.2015 | KÍF | H71 | 20-25 |
| 11.11.2015 | StÍF | H71 | 21-27 |
| 15.11.2015 | H71 | VÍF | 28-24 |
| 18.11.2015 | Neistin | H71 | 16-26 |
| 21.11.2015 | T. Klaksvík | H71 | 24-37 |
| 29.11.2015 | H71 | Kyndil | 29-24 |
| 13.12.2015 | H71 | KÍF | 24-19 |
| 16.12.2015 | H71 | StÍF | 21-22 |
| 19.12.2015 | Neistin | H71 | 20-20 |
| 06.01.2016 | VÍF | H71 | 19-17 |
| 09.01.2016 | H71 | T. Klaksvík | 38-21 |
| 17.02.2016 | H71 | Kyndil | |
| 28.02.2016 | KÍF | H71 | |
| 06.03.2016 | H71 | Neistin | |
| 13.03.2016 | StÍF | H71 | |
| 19.03.2016 | H71 | VÍF | |
| 23.03.2016 | T. Klaksvík | H71 | |
| 03.04.2016 | Kyndil | H71 | |
| 16.04.2016 | H71 | KÍF | |

## STØÐAN FTZ DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | H71 | 16 | 430 | 338 | 92 | 27 |
| 2 | VÍF | 16 | 426 | 407 | 19 | 21 |
| 3 | KÍF | 15 | 371 | 334 | 37 | 19 |
| 4 | Kyndil | 16 | 424 | 396 | 28 | 18 |
| 5 | StÍF | 15 | 392 | 390 | 2 | 13 |
| 6 | Neistin | 15 | 344 | 367 | -23 | 10 |
| 7 | T. Klaksvík | 15 | 341 | 496 | -155 | 0 |

# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**

1 Ári E. Dam
12 Tóraldur Kollsker
16 Johan Hofgaard

**Útileikarar:**

2 Djóni Vest Højgaard
3 Mark Lausen Marcher
4 Rúni Vest Højgaard
5 Rasmus Rasmussen
6 Boas Heinesen
8 Pætur Thomsen
11 Hans Kári Hansen
13 Oddur Bech
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
18 Andor Sivertsen
22 Helgi Hoydal
23 Hilmar Leon Jakobsen
45 Peter Krogh
89 Jónas Djurhuus
99 Tróndur Arge

*Venjarar:*
**Petur Mittún**
**Halgir Dahl Olesen**

*Málmansvenjari:*
**Jens à Skipagøtu**

*Liðleiðarar:*
**Petur Sivertsen**
**Rene Dahl Olesen**
**Andras Marr Poulsen**

## KYNDIL

**Málmenn:**

1 Jan Pauli T. Johannesen
16 Tórður S. Guttesen

**Útileikarar:**

3 Hans Arni B. Thomsen
7 Josef Abrahamsen
9 Hjalti Bachmann
10 Høgni Klein Olsen
11 David Edvardsen
19 Thorvald Abrahamsen
20 Finnur Hansson
21 Ludvík Súnason
22 Tróndur Wardum
23 Heini Edvardsson
26 Bjarni Sørensen
27 Bartal Klein Olsen
30 Hjalti Mohr Jacobsen
32 Hørður Fannar Sigtórsson
55 Frank B Askildsen

*Bonkur:*
**Julian J. Johansen**
**Bárður Johannesen**
**Leif Kristoffersen**
**Dávur Clementsen**

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT